# RUSSISKIR KA
# SNEYTA VIÐ FØ

**KAVBÁTAR** Kjarnorkuriknir kavbátar úr Russlandi eru sæddir beint uttanfyri føroyskt sjóøki fyri norðan. Á júst hesum øki hava Føroyar gjørt krav upp á alt kolvetni. Ellisif Tinna Víðisdottir, stjóri á íslendska verjustovninum, váttar at helst kannaðu russar økið fyri gass og olju

Eirikur í Jákupsstovu

Í august mánaði í fjør vórðu russiskir kavbátar fyri fyrstu ferð í 15 ár sæddir úti fyri Norðuramerikansku eysturstrondini, men longu tveir mánaðir framman-undan vórðu russiskir kjarnorkuriknir kavbátar sæddir í íslendskum, norskum og í altjóða sjógvi beint uttanfyri norðara markið til føroyskt sjóøki.

Økið, har minst tveir kjarnorkuriknir kavbátar hjá russiska herflotanum vórðu sæddir, er± sama øki, sum Føroyar vegna danska ríkið hava gjørt krav upp á.

Eftir øllum at døma leitaðu russar við fleiri kavbátum eftir kolvetni í júst hesum økinum, har Føroyar hava gjørt krav upp á alt ríkidømi í undirgrundini, og alt sum er á sjálvum botninum í 3000 metra djúpa havøkinum.

– Ein óvanlig ferð hjá russiskum kavbátum hevur í summar verið í Norðuratlantshavi, skrivar heimasíðan hjá Íslendska verjustovninum.

– Tveir russiskir rannsóknarkavbátar hjá russiska herflotanum, stuðlaðir av kjarnorkuriknum álops- og hjálparkavbátum, hava verið í økinum á Norðuratlantsrygginum úr Føroyum til Svalbards.

Í norska blaðnum Dagbladet váttar Ellisif Tinna Víðisdottir, stjóri á íslendska verjustovninum, tíðindini um, at kavbátarnir eftir øllum at døma kannaðu møguleikarnar fyri gassi og olju í økinum.

### NATO sá bátarnar

Kavbátarnir, ið seinasta summar vóru norðan fyri Føroyar, vórðu har mesta partin av juni mánaði og nakrar dagar í juli í fjør.

Tað vóru flogfør hjá NATO, sum løgdu til merkis, at kavbátarnir vóru í økinum, og við Dagbladet, segði stjórin á íslendska verjustovninum, at kavbátarnir eisini høvdu verið inni í norskum og íslendskum øki.

Sosialurin hevur roynt at fáa fleiri viðmerkingar frá verjustovninum í Íslandi, men haðani vilja tey í dag bert vátta, at tað er møguleiki fyri, at russar hava virksemi í økinum norðanfyri Føroyar, og at tey ikki hava meira at leggja afturat í hesum málinum.

### Vita onki í Føroyum

Hóast íslendingar eftir øllum at døma hava rættiliga stóra vitan um, hvat gongur



**ÁLOPSKAVBÁTAR**

*Kjarnorkuriknir álops- og hjálparkavbátar stuðlaðu tveimum russiskum rannsóknarkavbátum, sum vóru í sjóøkið norðanfyri Føroyar*

## Mugu styrkja verjuna

Niels Sindal, formaður danska bólkinum í Norðurlandaráðnum, metir tað vera týdningarmikið, at Norðurlondini styrkja um samstarvið sínámillum. Hann hugsar serliga í samband við arktisku økini, men metir tað sama vera galdandi fyri onnur øki fyri norðan.

– Vit síggja, at tað eru fleiri og fleiri lond har norðuri sum røra uppá seg. Tað er ein spurningur um suvirenitet, og tí er neyðugt, at mann kann avvísa fremmandum valdum, um teir taka sær rættindi, teir ikki hava. Í tí sambandi er sera týdningarmikið, at Norðurlondini standa saman, sigur Niels Sindal við Sosialin.

Hann leggur afturat, at tað sigur seg sjálvt, at Russland hevur áhuga í øllum økinum fyri norðan.

– Teir hava eina øgiliga stóra strond, og hava sjálvandi áhuga í havøkjunum, men tað kann gott vera, at russar hava loyvi til at sigla har í altjóða sjógvi, men hví skulu teir vera har millum Ísland og Føroyar?, spyr formaðurin fyri danska bólkin í Norðurlandaráðnum.

Um hvørji konkret tiltøk skulu setast í verk hevur Niels Sindal ikki nakað heilt víst boð uppá, men vísir á, at tað kundi verið rættiliga gevandi at tikið støði í Stoltenberg frágreiðingini, og onkursvegna hava eftirlit úr luftini, og síðan avvísa skipum, sum koma ov nær.

eij@sosialurin.fo



**EFTIRLIT**

*Tað er ein spurningur um suvirenitet, og tí er neyðugt, at mann kann avvísa fremmandum valdum, um teir taka sær rættindi, teir ikki hava, sigur Niels Sindal*